# Alex gevur okkum gott veður restina av vikuni

**Tað er tropiska ódnin Alex, sum er atvoldin til góða veðrið, sum nú um dagarnar - og veðrið fer at halda sær restina av vikuni**

SUMMARVEÐUR

*Orð: Eirikur Lindenskov, eirikur@sosialurin.fo*
*Myndir: Maria Olsen*

- Tað er tropiska ódnin Alex, sum seinastu dagarnar hevur ført við sær gott veður um okkara leiðir, sigur Petur Skeel Jacobsen, veðurmaður á Sosialinum.

Hann sigur, at lágtrýstið, sum er ein leivd av ódnini, grynnist so líðandi.

Ódnin hevur stongt av fyri lágtrýstinum, sum ikki sleppur hendanvegin. Lágtrýstið fer í ein landsynning og grynnist.

- Hátrýstið yvir norska havinum ger, at vit fáa sama veðrið restina av vikuni, sigur hann, og hetta førir við sær, at vit fáa sól restina av vikuni.

Hitin fer at liggja millum 16 og 20 stig.









WWW.SMYRIL-LINE.COM






**UPPLIVINGARNAR BYRJA** við tiltøkum og undirhaldi umborð og halda á, so skjótt fast er undir fóti. Óspilta náttúran, vakra landslagið, yðjandi djóralívið á sjógvi sum á landi og litfagri hetlendski søgu- og mentanararvurin gevur nýggjan íblástur.

Handlarnir í Lerwick liggja stutt frá atløgubryggjuni og hava opið vanligar dagar til kl. 17.00. Til ber at fáa góðar og bíligar dygdarvørur heim aftur við sær úr Hetlandi, teirra millum eisini forkunnigar lutir av hetlendskum uppruna.

Um steðgurin í Hetlandi verður stuttur ella langur, so eru útferðarmøguleikarnir fjølbroyttir. Útferðarfaldari fæst á skrivstovu okkara, so ætlanirnar kunnu leggjast longu heimanífrá.







**3-daga CRUISE**
**mánadag til mikudag**

Gisting á hotelli ............ úr 1.296,-
Privat gisting (B & B)..... úr 1.032,-
Gisting á Vallaraheimi...... úr 907,-

**6-daga CRUISE**
**fríggjadag til mikudag**

Gisting á hotelli ............ úr 3.162,-
Privat gisting (B & B)..... úr 2.051,-
Gisting á Vallaraheimi... úr 1.607,-

Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Lerwick og gisting í Hetlandi (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).



Á FERÐUNUM fara góðir pianoentertainarar at borðreiða við fjølbroyttum tónleiki.



GÓÐIR MØGULEIKAR eru til at íðka likamsvenjing í vælútgjørda venjingarhølinum.

**Í Hetlandi:**

- Søgulig støð/bygningar
- Mentanarlig tiltøk
- Vøkur náttúra
- Ríkt djóralív
- Livandi býarlív
- Innkeypsmøguleikar
- Útferðir / aktivitetir

**Umborð:**

- Tollfrí søla
- Dansur / undirhald
- Fitness-venjing
- Góður matur

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo

WWW.SMYRIL-LINE.COM



## Sølu- og marknaðarstjóri til SMYRIL LINE

Sølu- og marknaðardeildin skal hava nýggjan stjóra. Alt ferðafólkavirksemið er savnað á hesi deild, og tí verður søkt eftir einum dugnaligum sølu- og marknaðarstjóra at standa fyri framhaldandi menningini av virkseminum.

Tað liggur ein stór leiðsluuppgáva í at sameina, leiða og menna tey meira enn 40 starvsfólkini á sølu- og marknaðardeildini.

Ábyrgdarøkini og arbeiðsuppgávurnar hjá sølu- og marknaðarstjóranum eru:

- Fáa sum mest burtur úr sølu- og marknaðarvirkseminum – innanhýsis og uttanhýsis
- Áhaldandi meta um marknaðarvirksemið og úrslitið av hesum
- Skipa kundabólkar og menna tænastur
- Gera greiningar og uppskot um nýtt virksemi
- Skipa fyri tænastumenning
- Økja inntøkuna
- Evna til, leggja fram og seta í verk sølu- og marknaðarætlanir
- Leiða og eftirmeta marknaðarvirksemið hjá deildunum uttanlands
- Stuðla aðalsøluumboðunum og samráðast við tey um møguligt framhaldandi virksemi
- Eftirmeta sølu- og marknaðarvirksemið hjá aðalsøluumboðunum
- Læra upp og menna sølufólkini á deildunum og hjá aðalsøluumboðunum
- Leggja fíggjarætlanir og eftirmeta sølumálini

Roknast skal við nógvari ferðing í starvinum.

Sølu- og marknaðarstjórin vísir beinleiðis til Óla Hammer, stjóra, og hann møtir á nevndarfundum, tá spurningar viðvíkjandi sølu og marknaðarførslu verða viðgjørdir.

**Førleikakrøv**

Til tess at kunna røkja starvið hevur sølu- og marknaðarstjórin eina hægri sølubúskaparliga útbúgving ella samsvarandi royndir. Tað er ein fyrimunur, um viðkomandi hevur leiðsluroyndir frá eini sølu- og marknaðardeild, eins og tað eisini er ein fyrimunur at hava kunnleika um ferðavinnu.

Tað hevur týdning, at tann, ið settur verður, er vanur at arbeiða við søluumboðum.

Tað skal vera ein natúrligur eginleiki hjá umsøkjaranum at vera stigtakari og koma við uppskotum um nýtt virksemi. Sølu- og marknaðarstjórin skal duga at røkka settum málum og úrslitum, og somuleiðis skal hann duga at eftirmeta marknaðarætlanir, virksemi og fíggjarætlanir.

Sølu- og marknaðarstjórin skal vera fyrikomandi og vanur at tosa við fólk á øllum stigum í samfelagnum. Umsøkjarin skal duga enskt á høgum stigi bæði í skrift og talu.

Starvið hevur sostatt í sær bæði leiðlsu, sølu og marknaðarførslu. Umsøkjarar við hollum royndum innan leiðslu í marknaðarførslu verða tiknir framum.

**Smyril Line bjóðar**

Komandi sølu- og marknaðarstjórin á Smyril Line verður settur í eitt starv, sum hann sjálvur fær stóra ávirkan á. Talan er um eitt ógvuliga sjálvstøðugt starv við stórum frælsi.

Rætti umsøkjarin fær góða løn og eftirløn.

**Umsóknarfreist**

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til stjórarnar, Óla Hammer ella Jóannes á Váli, á telefon 34 59 85. Umsóknir skulu sendast til:

**Smyril Line**
**J. Broncks gøta 37**
**P.O. Box 370**
**FO-110 Tórshavn**

**Teldubústaður:**
**management@smyril-line.fo**

Seinasta freist at søkja starvið er 27. august 2004. Allar umsóknir og fyrispurningar verða viðgjørd í trúnaði.

Smyril Line varð stovnað í 1982 við tí endamáli at knýta oyggjasamfeløgini í Norðuratlantshavi, Føroyar, ísland og Hetland, tættari at Noreg, Danmark og restini av meginlandinum. Smyril Line er í dag einasta reiðarí, sum røkir ferðafólkaflutning á Norðuratlantshavi.

Á vári 2003 tók felagið nýggju cruise-ferjuna, M/F Norrönu, í nýtslu. Ferjan tekur 800 bilar og uml. 1.500 ferðafólk. M/F Norröna siglir alt árið í fastari rutu milum Danmark, Hetland, Føroyar, Ísland og Noreg. Nýggja ferjan uppfyllir ynskini hjá nógvum evropeiskum ferðafólkum um eina virkna frítíð í Íslandi, Føroyum og Hetlandi. Umframt ferðafólkaflutningin er farmaflutningur ein stórur partur av umsetninginum hjá felagnum.

Smyril Line hjálpir eisini ferðafólkum á norðuratlantisku ferðamálunum við at leggja til rættis eitt nú útferðir, gisting og bilaleigu. Harumframt veitir felagið eisini teimum ferðandi – bæði einstaklingum og bólkum – ymsar pakkaloysnir á staðnum.

Smyril Line hevur høvuðsskrivstovu í Tórshavn og skrivstovur við egnum starvsfólkum í Danmark, Noreg, Hetlandi, Íslandi og Týsklandi. Reiðaríið hevur aðalsøluumboð í Svøríki, Sveis, Benelux-londunum, Eysturríki, Fraklandi og Italia.

Smyril Line er í eini spennandi menningartíð og áhugin fyri vørum og tænastum hjá felagnum økist alsamt.

Fleiri upplýsingar um felagið fáast á www.smyril-line.fo

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · management@smyril-line.fo